

*Føroyska Meginlandsstøðið. Fjarstøðan frá flogvøllinum er merktur upp í mílum. Verður talan um tyrluflutning á føroyskum hondum, verður talan um at flúgva ímillum 110 og 230 míl*

# Tyrluflutningur kann geva nógv arbeiðspláss í oljuvinnuni

*– Men tað er skjótt at koma í óføri so vit mugu vera sera varin og ikki leypa framav.*

Áki Bertholdsen

Liggja føroyingar framvið, kunnu vit fáa nógv arbeiðspláss burturúr tørvinum hjá oljuvinnuni fyri flutningi.

Hetta kann lesast í eini frágreiðing, sum ein nevnd hevur gjørt um tyrluflutning á føroyskum hondum í sambandi við eina komandi oljuvinnu í Føroyum.

Nettupp tyrluflutningurin hevur verið nevndur sum ein upplagdur møguleiki hjá føroyingum at gera seg galdandi í eini komandi oljuvinnu, og fyri einum ári síðani setti landsverkfrøðingurin og Statens Luftfartsvæsen eina nevnd at kanna, hvørjir møguleikar eru og, hvørji krøvini eru.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini var at kanna, hvørji krøv skulu lúkast fyri at føroyingar kunnu fara undir tyrluflutning út á boripallar í einum øki, sum liggja á leiðum, tað er náttúrligt hjá føroyingum at flúgva til.

Meginparturin av frágreiðingini er ein teknisk uppgerð um, hvørji krøvini eru, hvør setir krøvini, hvussu krøvini kunnu lúkast.

Í nevndini sótu Dávid Reinert Hansen, verkfrøðingur hjá landsverkfrøðinginum, Ragnar Heinesen, verkfrøðingur hjá landsbyggifelagnum, Mads K. Johannesen, varaflogferðslu-inspektørur í Vágum og Jákup Persson, varastjóri á flogvøllinum í Vágum.

Fyrr í ár løtu teir frágreiðingina úr hondum.

## Fimm ár fram

Í arbeiðinum hevur nevndin roynt at meta um gongdina fimm ár fram.

– Metingar, sum hesar, skulu takast við størsta fyrivarni, tí tað er so nógv, sum kann koppa teimum, bæði ein og annan veg, og vit hildu okkum so slett ikki til at meta longur fram, sigur tann eini nevndarlimurin, Ragnar Heinesen.

## Nakrir mánaðir

Roknast kann við, at tað ganga bara nakrir fáir mánaðir frá tí oljan er bjóðað út til tann fyrsti royndarboripallurin er til reiðar at bora.

Í kanningartíðini, sum kanska gongur yvir tvey ár, fara einir 2-5 boripallar at verða undir Føroyum, stendur í frágreiðingini.

Verða so stórar nøgdir av olju funnin, at tað loysir seg at bora eftir henni, verður farið undir fyribils boringar.

Tá ið fyribils boringin er liðug, verður endaliga gjørt av, um farast skal at bora av álvara.

Í tíðini 2-5 ár eftir at oljan er boðin út, verða 1-3 oljuøki fyrireikað, men oljufeløg fara framvegis at leita eftir fleiri.

– Tá ið hesi fimm árini eru farin, er framleiðslan komin í fasta legu, men leitingin heldur fram.

## 500 fólk

Útgangsstøðið hjá nevndini er, at 80 fólk eru á hvørjum palli, og at framleiðslan er av skipi, við 40-50 fólkum.

Manningarnar eru úti í tvær vikur og hava so frí í tvær.

Talan verður um tvey sløg av fólki. Tey, sum búgva í Føroyum og tey, sum búgva aðrastaðni.

Nevndin roknar við, at 20 % av hesum fólkum ikki eru „off shore" sertrøðingar og øll hesi fólkini verða føroyingar.

Samstundis verður roknað við, at nakrir „off shore" sertrøðingar flyta til Føroyar við tíðini.

– Eftir hesum at døma koma eini 30-40% av manningunum at búgva í Føroyum og 60-70% búgva uttanlands.

Tey, sum ikki búgva í Føroyum, verða sostatt fyrst flutt higar við flogfari og síðan út á pallarnar við tyrlu.

Í løtuni ferðast 100.000 fólk um flogvøllin í Vágum, men tað fara ikki stórvegis trupulleikar at standast av at økja talið til 120.000 eftir nøkrum árum.

Hildið verður, at eini 30.000 fólk skulu flytast aftur og fram í sambandi við oljuvinnuna.

– Roknað verður við, at tað verða einir 2-5 pallar og 1-3 framleiðsluskip undir Føroyum um fimm ár.

Hetta gevur millum 200 og 550 fólk á feltunum. Tað fer at krevja millum 7 og 18 flogferðir um vikuna.

– Sostatt kann í mesta lagi roknast við 18 føstum túrum um vikuna, sigur frágreiðingin. Varar hvør túrur tríggjar tímar, er talan um 2800 flúgvitímar um árið.

Verður gingið eftir enskum prísi, sum er umleið 25.000 krónur um tíman, verður talan um ein umsetning uppá 70 milliónir um árið.

Men afturat hesum koma so teir leysu túrarnir, og teir eru ikki so fáir, serliga í fyrireikingartíðini, áðrenn boringin er komin í fasta legu.

Nevndin roknar við, at neyðugt verður við trimum tyrlum til hesa flúgvingina.

At manna tyrlurnar og taka sær av ferðafólkum, skulu eini 30-40 fólk til.

Men harafturat koma arbeiðspláss í vinnum, sum eru knýttar at tyrluflutninginum, t.d. starvsfólk á flogvøllinum, flutningur til og av flogvøllinum, arbeiði til tey, sum hava og umsita trygdarútgerð, umframt annað, avleidd virksemi aðrastaðni í samfelagnum.

Nevndin sigur, at hetta er lítið afturímóti tí, flutt verður úr Skotlandi og Noregi, út á oljuøkini.

## Stórar tyrlur

Tyrlurnar, brúktar verða, e-



